# Árfrágreiðing FURs fyri árið 2020



20. MARS 2021

FØROYA UNGDÓMSRÁÐ

# Innihaldsyvirlit

Innihaldsyvirlit ... 2
Føroya Ungdómsráð ... 3
Fíggjarlig viðurskifti ... 3
Starvsstjórnin ... 4
Dagliga virksemið ... 4
Árligur stuðul ... 4
Stuðulsgrunnur FURs ... 5
Umsóknir til Stuðulsgrunn FURs ... 6
Heiðurslønir ... 7
Heiðurslønir latnar á Landsfundi FURs 2020 ... 7
Astrid Joensen, Havnar KFUK skótar ... 7
Alisa Hammer, Blá Krossur Ungdómur ... 7
Áslakur Heinesen, Skótabólkurin Leirvíks Páll ... 8
Verkætlan - kynsligur ágangur ... 8
Lýsingastuðul - portal.fo ... 8
Les og Lær í Føroyum ... 9
Umboðan og uttanlands virksemi ... 9
Føroyska UNESCO nevndin ... 9
Umboð í nevnd at arbeiða við javnstøðu ... 9
Nordbuk NORDEN 0-30 ... 10
NSU ... 10
Nordic Youths in Sustainable Communities ... 10
Ráðstevnur, skeið og grunnur ... 11
NSU - Be the Best version of yourself ... 11
NSU - Norðurlendskar brýr ... 11
NSU - Søgan til framtíðina ... 11
Nordic Youth Summit on the Future Gender Agenda and Beijing+25 ... 11
NUBF - skeið ... 11
NUBF - Norðurlendski ungdómsgrunnurin ... 12

# Føroya Ungdómsráð

***FUR er felagsumboð fyri landsumfatandi barna- og ungdómsfelagsskapir í Føroyum við 49 feløgum, harav 20 limafeløg og 29 lokalfeløg,***

***FUR umboðar samantalt umleið 4.000 børn og ung í Føroyum yngri enn 30 ár, sum eru í sjálvbodnum barna- og ungdómsfelagsskapum við fjølbroyttum frítíðarvirksemi innan sjónleik, tónleik, føroyskan dans, kórsang, fráhaldsvirksemi, politisk ungmannafeløg, mannarættindi, kristiligt barna- og ungdómsvirksemi, millumlanda barnalegur, skiftisnæmingar, skótar og annað barna- og ungdómsvirksemi.***

FUR hevur til endamáls, at:

- vera felagsumboð fyri limafelagsskapirnar
- viðgera spurningar, ið viðvíkja føroyskum ungdómi
- skapa áhuga fyri ungdómsmálum
- eggja ungdóminum at taka lut í og fáa ávirkan á samfelagið
- umboða limafelagsskapirnar í samstarvi við myndugleikarnar
- menna samstarvið og sínámillum fatan millum føroyskan ungdóm
- menna millumtjóða fatan

# Fíggjarlig viðurskifti



FUR verður fíggjað á Fíggjarlógini og við veddingarpengum, sbrt. løgtingslóg um ítróttarvedding, og við limagjaldi.

Játtanin á fíggjarlógini til FUR var í 2020 óbroytt kr. 330.000 sammett við undanfarin ár. Játtanin er til at stuðla ungdómsarbeiði til tess at menna ungdómin í øllum lutum. Stuðul verður m.a. veittur til upplýsing um útbúgvingarmøguleikar, sum FUR stendur fyri.

FUR fekk lutað kr. 2.938.000 frá Sp/f Ítróttarvedding í 2020 í sín part.

Harafturat fekk FUR kr. 4.100 í limagjaldi frá limafeløgunum í 2020.

# Starvsstjórnin

FUR verður stjórnað av einari starvsstjórn, sum hevur 5 limir og 2 eykalimir. Starvsstjórnarlimir verða valdir á landsfundinum fyri eitt ár í senn, men formaðurin verður valdur fyri 2 ár og síðan fyri 1 ár.

Starvsstjórnin vald á Landsfundi FUR's í 2020:
Rói B. Poulsen, *formaður*
Ragna Maja Kruse, *nevndarlimur*
Brandar Heðinsson, *nevndarlimur*
Ebba Sofía Kruse, *nevndarlimur*
Bogi Petersen, *nevndarlimur*
Asta Abrahamsen, *eykalimur*
Silja Av Reyni Wennerström, *eykalimur*



Starvsstjórnin hevur havt 6 fundir í starvsstjórnarskeiðnum 2020-2021.
Landsfundur FURs 2020 skuldi vera 28. mars 2020, men varð vegna Corona útsettur til 4. Juli 2020. Av hesi orsøk varð seinasta tíðarskeiðið hjá sitandi stjórn longt, til Landsfundur kundi verða hildin og núverandi tíðarskeið er tí styttri enn vanligt.

# Dagliga virksemið

FUR umsitur árliga stuðulin sambært løgtingslóg um ítróttarvedding til limafeløg og lokalfeløg og sambært reglugerð og viðtøkum fyri FUR og skal tryggja m.a., at treytirnar eru loknar, og at stuðulin verður nýttur sambært reglugerðini.




Eisini umsitur FUR Stuðulsgrunn FURs, har talan somuleiðis er um fyrisiting og um starvsstjórnaravgerðir. FUR fyrireikar somuleiðis fyrispurningar og tilmæli í sambandi við limaupptøku og møgulig tilmæli um eksklusión.

FUR er virkin limur í Norðurlendsku Samskipanini fyri Ungdómsarbeiði (NSU). FUR luttekur í fyriskipanini og samskipar kunning o.a. í sambandi við, at føroysk ung luttøka á ráðstevnum, leiðaraskúla, ungdómsviku o.a.

FUR svarar ymsum dagligum fyrispurningum í sambandi við barna- og ungdómsarbeiði frá einstaklingum, felagsskapum í Føroyum og uttanlands og frá føroyskum myndugleikum o.a. FUR kann eisini taka stig til verkætlanir og luttaka í verkætlanum.

# Árligur stuðul

Fyri at fáa árligan stuðul skal talan vera um landsfelagsskap, sum er limur í FUR, ella lokalfelag, sum hevur limaskap í einum av limafelagsskapum FURs.

17 limafeløg og 21 lokalfeløg fingu játtað árligan stuðul í 2020 fyri stuðulsárið 2019.

Landsfeløgini fingu kr. 1.249.330 samanlagt, og lokalfeløgini fingu samanlagt kr. 729.619 í 2020. Samlaður árligur stuðul til limafelagsskapir og lokalfeløg var kr. 1.978.950 í 2020.

Limafelagsskapir, sum søkja, skulu lúka hesar treytir og hava:

1. Heimstað í Føroyum.
2. Í minsta lagi 30 gjaldandi limir undir 30 ár tann 31.12. í undanfarna ári við umboðum í minst trimum av hesum økjum: Suðurstreymoy, Norðurstreymoy, Vágum, Eysturoy, Norðoyggjum, Sandoy og Suðuroy.
3. Limagjald, sum skal vera í minsta lagi 100 kr. árliga fyri hvønn einstakan lim.
4. Í minsta lagi 30 gjaldandi limir í undanfarna kalendaraári.
5. Fólkaræðisligar viðtøkur við ásetingum, sum tryggja, at limir yngri enn 30 ár hava ávirkan á leiðsluna.
6. Egna nevnd og egið virksemi.
7. Sent umsókn rættstundis, sbrt. § 4 í hesi reglugerð.




*Stk. 4.* Lokalfeløg, sum søkja, skulu lúka hesar treytir og hava:

1. Heimstað í Føroyum.
2. Í minsta lagi 10 gjaldandi limir undir 30 ár tann 31.12. í undanfarna ári. Eru fleiri enn eitt lokalfelag í sama býi/bygd, skulu tey fylgjandi lokalfeløgini hava í minsta lagi 25 gjaldandi limir hvørt.
3. Limagjald, sum skal vera í minsta lagi 100 kr. Árliga fyri hvønn einstakan lim.
4. Í minsta lagi 10 gjaldandi limir í undanfarna kalendaraári.
5. Fólkaræðisligar viðtøkur við ásetingum, sum tryggja, at limir yngri enn 30 ár hava ávirkan á leiðsluna.
6. Egna nevnd og egið virksemi.
7. Verið limir í landsfelagi í minsta lagi eitt ár, áðrenn tey kunnu søkja um stuðul - tó undantikið úr Stuðulsgrunni FURs.
8. Limaskap í einum landsfelagi. Lokalfeløg kunnu - í stuðulshøpi - bara vera limir í einum landsfelagi.
9. Sent umsókn rættstundis, sbrt. § 4 í hesi reglugerð.

Næmingafeløg verða ikki roknað sum lokalfeløg, men tey kunnu søkja stuðul, sum er kr. 2.000,- hvørt ár. Stuðul kann ikki verða veittur ítróttarligum endamálum.

# Stuðulsgrunnur FURs

Eftir umsókn kann stuðul verða latin limafelagsskapum og lokalfeløgum fyri serliga góðar verkætlanir børnum og ungum at gagni ella fyri samfelagsgagnligar verkætlanir, har børn og ung eru virkin.



Stuðul úr Stuðulsgrunni FURs verður býttur so ofta, sum starvsstjórnin heldur tað hóska best. Ongar umsóknarfreistir eru galdandi, og umsóknir koma til viðgerðar og verða svaraðar, so hvørt tær koma inn.

Tey, sum fáa stuðul úr Stuðulsgrunni FURs, hava skyldu til at lata FUR skrivliga frásøgn frá tí stuðlaðu verkætlanini í seinasta lagi 3 mánaðir eftir, at hon er framd. Frágreiðingarnar verða lagdar á heimasíðu FURs fur.fo. Stuðul verður bert latin eina ferð til sama tiltak. Starvsstjórnin tekur støðu til umsóknirnar. Starvsstjórnin kann eisini lata vera við at veita stuðul, um eingin skikkað umsókn eftir hennara meting er komin.

Serstakt umsóknarblað er gjørt, sum skal fyllast út, so allar upplýsingar eru til taks, tá ið starvsstjórnin viðger og tekur støðu til umsóknirnar.

# Umsóknir til Stuðulsgrunn FURs

Stuðulin úr Stuðulsgrunni FURs í 2020 lutaður út til verkætlanir hjá feløgunum var kr. 303.924. Harumframt var stuðul latin úr grunninum til heiðursløn og til verkætlanina kynsligur ágangur. Samanlagt kr. 413.261.

**Stuðulsgrunnur FURs 2020 – umsøkjarar, verkætlanir og avgerðir**

| Stuðulsgrunnur FURs | Verkætlan | Stuðuls-umbøn | Avgerð | Játtað |
|---|---|---|---|---|
| **Blákross Ungdómur** | Suntprat – luttøka á ráðstevnu um effektivar og virðiligar samrøður um rúsevni, 2 pers. Avlýst vegna Corona. BKU fekk ikki endurgjald fyri ferðaseðlarnar og starvsstjórnin avgjørdi tí ikki at krevja peningin afturgoldnan. | 19.620 | Ja | 2.800 |
| **Sosialistisk Ung** | DSU páskaskeið - luttøka 6 pers. Avlýst vegna Corona og peningurin er afturfluttur | 6.350 | Ja | 6.350 |
| **Sosialistisk Ung** | 10 ára hald | 5.500 | Nei | - |
| **Sosialistisk Ung** | Tiltak at organisera og engagera ung í Suðuroy í politiskum ungdómsarbeiði | 2.625 | Ja | 2.625 |
| **Sosialistisk Ung** | Tiltak fyri nýggjar limir í Haraldssundi | 1.800 | Ja | 1.800 |
| **Blákross Ungdómur** | Kunningartilfar til átakið #rúsfríarløtur | 30.000 | Nei | - |
| **CISV** | Northern Lights Workshops – luttøka á ráðstevnu, 2 pers. Avlýst vegna Corona og peningurin er afturfluttur | 3.200 | Ja | 2.800 |
| **Dramaverkstaðið** | Skeið í eldblásing og gykl | 30.000 | Ja | 12.000 |
| **Skótalið Magnus Heinasonar, KFUK skótarnir í Klaskvík og Skótalið Nólsoyar Páls** | Merkir í samband við smáskótadag í Klaksvík | 5.499,38 | Ja | 5.499 |
| **Skótalið KFUM's** | 3 shelter (føroysk skýli) Ímillum Tjarna Havnardalur | 280.000 | Ja | 60.000 |
| **Havnar KFUK skótar** | Ráðstevna um bólkaleiðslu fyri skótabólkar á "ungdomsøen" uttanfyri Keymannahavn. Ráðstevnan er útsett vegna Corona. | 50.000 | Ja | 1.400 til 15 pers. t.e. í mesta lagi kr. 21.000 |
| **Blákross Ungdómur** | Rúsfrí konsert/tiltak. Konsertin/tiltakið er útsett vegna Corona. | 30.000 | Ja | 10.000 |
| **Sosialistisk Ung** | Opið hús á Ólavsøku | 4.000 | Nei | |
| **Sosialistisk Ung** | Skeið í rødd og framburði av teksti | 16.875 | Ja | 10.000 |
| **Sosialistisk Ung** | Gokart og upplegg um abort, frá ProVita og fríum vali | 1.959 | Nei | - |
| **Ung í dansi** | Dansiferð við børnum til Danmarkar í 2021, 60 pers. | 48.000 | Ja | 48.000 |
| **Føroya KFUK skótar 25.000** | Skeið at varðveita og førleikamenna eldru skótarnar, 10 skótar | 25.000 | Ja | 16.800 |
| **Havnar KFUK skótar** | 4 skýli (shelters) og bálpláss við skótasmáttuna á Langasandi | 500.000 | Ja | 150.000 |
| **Skótalið KFUM's** | Ungdómsmiða ímillum Tjarna í Havnardali | 345.000 | Ja | 50.000 |

Starvsstjórnin hevur viðgjørt 19 umsóknir um stuðul úr stuðulsgrunni FURs í 2020 frá lands- og lokafeløgum í FUR. 15 verkætlanir fingu játtandi svar, 4 umsóknir fingu noktandi svar.

# Heiðurslønir

Starvsstjórnin í FUR letur árliga heiðursløn til verkætlanir og einstaklingar. Heiðurin verður latin á landsfundi FUR's. Latnar vera upp til tríggjar heiðurslønir. Heiðursløn FURs er eitt heiðursbræv og ein heiðursløn kr. 5.000 - 10.000.

Veittar kunnu verða millum ein og tríggjar heiðurslønir. Heiðurslønin verður givin einstaklingum og verkætlanum.

Øll kunna innstilla verkætlanir og einstaklingar til heiðursløn m.a. eru tað ikki bert feløgini í FUR og nevndirnar í feløgunum, sum  kunnu innstilla, men eisini einstakir limir, eins og foreldur v.m.

Til ber at lata inn fleiri innstillingar og at senda innaftur áður innsendar innstillingar.

Endamál FURs við at lata heiðurslønina er:
1. at geva eldsálum innan barna- og ungdómsfelagarbeiði viðurkenning
2. at geva virknum barna- og ungdómsfeløgum viðurkenning fyri sítt arbeiði
3. vekja áhugan millum børn og ung fyri sjálvbodnu barna- og ungdómsfelagsskapunum
4. at vísa á samfelagsliga týdningin av arbeiðinum hjá sjálvbodnum barna- og ungdómfelagsskapum.

## Heiðurslønir latnar á Landsfundi FURs 2020

Á landsfundinum hjá FUR 4. juli 2020 handaði Rói B. Poulsen formaður í FUR heiðurlønirnar, sum stjórnin hevur avgjørt at lata til Astrid Joensen, Havnar KFUK skótar,  Alisu Hammer, Blái Krossur Ungdómur og Áslakur Heinesen, Skótabólkurin Lervíks Páll.

### Astrid Joensen, Havnar KFUK skótar

Heiðursløn varð latin til Astrid Joensen, Havnar KFUK skótar fyri at vera ein sonn eldsál fyri Havnar KFUK-skótar og alla skótarørsluna. Astrid hevur ein livandi áhuga fyri skótarørsluni sum heimsumfatandi felagsskapi, og hevur skipað fyri og verið á nógvum legum og túrum í Føroyum og kring allan heimin. Astrid hevur stóra námsfrøðiliga vitan, er virkisfús, kreativ og stuðlandi og tekur stóra ábyrgd bæði hjá Havnar KFUK-skótum, Føroya KFUK-skótum og í Føroya Skótaráði.





### Alisa Hammer, Blá Krossur Ungdómur

Heiðursløn varð latin til Alisa Hammer, Blá Krossur Ungdómur fyri at gera eitt sera stórt arbeiði ímillum børn og ung, sum koma frá heimum, ið hava rústrupulleikar. Alisa er eitt menniskja við einum stórum hjarta, sum gevur alt fyri at hjálpa einum mestsum ósjónligum bólki í okkara samfelag – børnum, ungum og familjum hjá fólki, ið hava trupulleikar við rúsdrekka og rúsevnum.

**Áslakur Heinesen, Skótabólkurin Leirvíks Páll**



Heiðursløn varð latin til Áslakur Heinesen, Skótabólkurin Leirvíks Páll fyri sítt megnar arbeiði í KFUM skótabólkinum Leirvíks Páll. Áslakur hevur serstakliga gott tak á børnunum og leggur stóran dent á, at læra børnini at verða sjálvbjargin, at kenna ábyrgd og harvið gerast dugnaligir samfelagsborgarar, sum er partur av endamálinum hjá KFUM skótunum í Føroyum. Í 45 ár hevur skótabólkurin havt gleði av arbeiðinum, sum Áslakur hevur lagt í skótarnir, og hetta hevur uttan iva eisini havt eina jaliga og mennandi ávirkan á lívið hjá nógvum børnum og ungum.

# Verkætlan - kynsligur ágangur

FUR er farið undir eina verkætlan um kynsligan ágang. Endamálið við verkætlanini er at gera tilfar, sum er málrættað til nevndir og leiðarar og til børn og ung innan sjálvboðið barna- og ungdómsarbeiðið í feløgunum í FUR.

- at fyribyrgja og
- at handfara støður viðvíkjandi kynsligum ágangi

Lógargrein 34 í ST Barnarættindasáttmálanum sigur, at børn skulu verjast ímóti øllum sløgum av kynsligari misnýtslu og kynsligum ágangi.
Ætlanin er at gera kunningartilfar og ein leist fyri hvussu evnið kann takast upp í feløgunum.
Avbjóðingin er at gera tilfar, sum er miðvíst til málbólkin hjá FUR og, sum er lutfalsliga lætt at koma til og brúka.

# Lýsingastuðul - portal.fo

FUR hevur fingið kr. 100.000 frá Portalinum í stuðli til lýsingar, av teimum kr. 50.000 til Les og Lær í Føroyum og kr. 50.000 til at kunna um Barna- og ungdómsarbeiði hjá feløgum, sum eru limir í FUR.

FUR kann sostatt lýsa ókeypis fyri limafelagsskapir og lokalfeløg í sambandi við lýsingarstuðulin frá Portalinum
Tað ber til t.d. at lýsa um:

1. Felagið generelt
2. Melda teg sum lim
3. Aðalfund
4. Tiltak (tað kann vera bæði limatiltak og alment tiltak)

Til endamálið hevur FUR gjørt eitt einfalt umsóknarskjal. Spurt verður, um endamálið við lýsingini, og um dagfesting, nær lýsingin skal takast av. Eisini verður biðið um ein stuttan tekst til lýsingina - *mælt verður til at leggja meiri útgreinaðan og nágreiniligan tekst á heimasíðuna ella á facebook profilin hjá felagnum, har* lýsingin skal leinkja til t.d. heimasíðu ella facebook og mynd. Feløg í FUR hava brúkt møguleikan at lýsa ókeypis á portal.fo ígjøgnum FUR.

# Les og Lær í Føroyum

Les og Lær í Føroyum er eitt samstarv millum FUR, Mentamálaráðið, yrkisfeløg og arbeiðsgevarafeløg. Ein grundleggjandi fortreyt fyri, at ung útbúgva seg í Føroyum, er kunning um útbúgvingartilboðini í Føroyum. Tískil tók FUR í 2013 stig til Les og Lær í Føroyum.




Les og Lær í Føroyum fevnir um tvær heimasíður, har upplýsingar um læru og lestrarmøguleikar í Føroyum eru savnaðar. Fyrstu 4 árini var bók útgivin, men avgjørt var ikki at úgeva tilfarið í bók og tí ístaðin at raðfesta talgilda miðling.

Á heimasíðuni www.les.fo eru lýsingar av útbúgvingum, vegleiðingar, filmsbrot og onnur kunning. Heimasíðan www.studyinfaroeislands.fo er ætlað lesandi úr útlondum og lýsir tí útbúgvingar, stakgreinar og onnur lestrartilboð, sum eru áhugaverd í hesum sambandi. Síðan fevnir eisini um praktisk viðurskifti, t.d. uppihaldsloyvi, arbeiðsloyvi, bústaðarmøguleikar, skattlig viðurskifti, livikostnað o.a.

Tilfarið er savnað inn frá Mentamálaráðnum, Yrkisdeplinum, útbúgvingarstøðum, stovnum og fyritøkum.

# Umboðan og uttanlands virksemi

## Føroyska UNESCO nevndin



Uttanríkis- og mentamálaráðið bað FUR um tilnevna eina kvinnu og ein mann til føroysku UNESCO nevndina til landsstýrismannin at velja ímillum. FUR innstillaði 2 umboð. Landsstýrismaðurin í Uttanríkis- og mentamálum valdi at tilnevna umboðið fyri KFUK skótarnar í Klaksvík, Elsebeth Heðinsdóttir Christiansen til UNESCO nevndina. Talan er um eitt 4 ára nevndartíðarskeið.

## Umboð í nevnd at arbeiða við javnstøðu

Uttanríkis- og mentamálaráðið heitti á FUR um at tilmæla eitt ungdómsumboð í aldrinum 18-20 ár at luttaka í fokusbólki undir Norðurlandaráðnum, sum skal lýsa sjónarmiðini hjá teimum ungu um javnstøðu í Norðurlondum við støði í FN konventiónini um javnstøðu.

FUR innstillaði umboð frá Framsøkin Ung í fokusbólkin, sum síðani hevur luttikið í arbeiðinum i fokusbólkinum. Arbeiðið er liður í raðfestingunum hjá danska formansskapinum í 2020 og ungdómsráðstevnuni um

javnstøðupolitikk, sum skuldi vera í 12. mai 2020 í Keypmannahavn, men er útsettur vegna Corona.

## Nordbuk NORDEN 0-30

FUR hevur umboð í einari løntari nevnd 2020-2021 undir Nordbuk NORDEN 0-30. Umboðið er frá Sosialistisk Ung. Talan er um stuðulsskipan til norðurlendska barna- og ungdómsarbeiðið. Stuðulsskipanin er til verkætlanir og netverk, har børn og ung hittast at vera við í mentunarligum, politiskum og/ella sosialigum virksemi.

## NSU

**Vision**

NSU's vision är, att vara plattform för Nordens mångfaldiga frivilliga ungdomsarbete, där kompetensutveckling, inspiration och inblick i aktuella ämnen skapas i en innovativ och stark nordisk gemenskap.

NSU umboðar umleið 700.000 limir í barna- og ungdómsfeløgum í Norðurlondunum. Endamálið hjá NSU er at styrkja samstarvið og felagskensluna millum politiskar óheftar ungdómsfelagsskapir í Norðurlondum og at fremja fakligu- og mentanarligu endamálini, sum hesi feløgini virka fyri.

Nordisk Samorganisation for Ungdomsarbejde

Á hvørjum ári skipar NSU fyri ungdómsviku, ráðstevnum og verkstovum fyri børn og ung, sum limafeløg og lokalfeløg í FUR hava møguleikan at senda umboð til.

Brandar Heðinsson er umboð fyri FUR í stýrinum fyri NSU síðani 2018.

## Nordic Youths in Sustainable Communities

FUR eru virkin partur í Nordic Youths in Sustainable Communities (NUBF), sum Norðurlandaráðið fíggjar. Dans Ungdoms Fællesråd (DUF) leiðir verkætlanina saman við systirfelagsskapirnar í Norra, Svøríki, Íslandi og FUR í Føroyum.

FUR hevur 2 umboð í stýrisbólkinum fyri verkætlanini og 1 umboð í stuðulsgrunninum.

Endamálið hjá NUBF er at menna burðardyggar felagsskapir og at knýta sterkari bond millum ung í Norðurlondum.

NUBF bjóðar skeið, bæði fysisk og online, og ein stuðulsgrunn, sum stuðlar verkætlanir til ung.

# Ráðstevnur, skeið og grunnur

## NSU - Be the Best version of yourself



Umboð fyri Føroya KFUK skótum hevur luttikið á ungdómsvikuni hjá NSU í Íslandi “Be the Best version of yourself”. Evnið var sjálvsmenning.

## NSU - Norðurlendskar brýr

Í 2021 bjóðar NSU skeiðið "Norðurlendskar brýr - Hvussu kunnu ungdómsfeløg handfara polarisering og ekskludering?” Aldursbólkurin er 20+ ár og málbólkurin er nevndarlimir, starvsfólk og sjálvboðin í norðurlendskum- og baltiskum ungdómsfeløgum. Skeiðið er ætlað at vera í Tallin í Estlandi 12.-14. mai 2021.

## NSU - Søgan til framtíðina

NSU bjóðar eisini til ungdómsviku: “Søgan til framtíðina - hvat kann man læra frá seinastu 75 árunum, sum kann hjálpa til at gera meiri inkluderandi samfeløg?”
Aldursbólkurin er 14-22 ár, tó eru eldri ung eisini vælkomin og gjarna sum leiðarar av onkrum slagi, alt eftir førleikum. Skeiðið verður eftir ætlan 5 dagar í juli 2021 í Keypmannahavn.

## Nordic Youth Summit on the Future Gender Agenda and Beijing+25

Almannamálaráðið bað FUR um at finna ein breitt umboðandi bólk av fimm ungum, sum hava áhuga fyri javnstøðu til at vera við á ráðstevnuni *”Nordic Youth Summit on the Future Gender Agenda and Beijing+25”*, sum skuldi vera í Keypmannahavn 12. mai 2020. Fimm ung frá Framsøkin Ung, Unga Samband, Sosialistisk Ung og Amnesty skuldu umboða Føroyar á ráðstevnuni. Ráðstevnan er avlýst vegna Corona.

## NUBF - skeið




Í november og desember í 2020 vóru online skeið í inklusión og heimsmálini.

Í 2021 er møguleiki at luttaka á skeiðum og at søkja um stuðul úr grunninum hjá NUBF. ”Ungetræning” verður á ungdómsoynni uttanfyri Keypmannhavn 18.-20. juni 2021.

Við at luttaka á “Ungetræning” fáa ung møguleikan at fáa íblástur til verkætlanir, praktiska hjálp við at søkja um stuðul úr grunninum og møguleikan at hitta ung frá øðrum norðurlendskum londum, sum tey kunna gera verkætlanir saman við.

Málbólkurin er ung í aldrinum 16-30 ár. Luttøkan er ókeypis og til ber at søkja FUR um stuðul til ferðina. Freistin at søkja um upptøku til Youth Training er 15. apríl 2021.

# NUBF - Norðurlendski ungdómsgrunnurin

Endamálið við norðurlendska ungdómsgrunninum er, at menna burðardygg samstørv millum ungdómsfelagsskapir í Norðurlondum.

Við stuðli úr grunninum kunnu ung skipa fyri virksemi tvørturum landamørk og styrkja netverk millum ung í Norðurlondum. 7 ung úr norðurlondum eri í nevndini, sum játtar stuðul. FUR hevur 1 umboð í nevndini í 2021.

Fyri at søkja um stuðul mugu í minsta lagi 2 lond verða umboðað í verkætlanini. Høvuðsevnini eru fólkaræði, burðardygd og mentan.

Ung í aldrinum 16-30 bæði leggja til rættis og standa fyri verkætlanunum.

Í 2021 eru 2 umsóknarfreistir; 6. apríl og 16. august.

